# Í lagi at ver



**Hann droymir um eitt lív við og í tónleikinum, men hann noktar at fylgja rákinum. Vit hava hitt hugsunarsama tónleikaran aftanfyri ársins mest sermerktu fløguútgávu til eitt prát um kenslur, klisturmerkjatrúgv, list og politiska líkasælu**

SAMRØÐA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

– Eg áni ikki, hvat tað vil siga at vera cool og tjekkaður. Og eg má skuffa teg, um tú heldur, tað býr okkurt aftanfyri, at eg havi klipt mær og fingið nýggjar brillur.

Knút Háberg Eysturstein, sum vit kenna best sum keyboardleikarin í Gestum við tí síða fruntinum, tungu brillunum og álvarsama andlitsbránum hevur hug at flenna, tá eg spyrji, hví hann hevur valt sær sær eitt so nørdut image.

– Heilt erligt, so er hatta ikki nakað, eg havi gjørt mær stórvegis tankar um. Eitt image er bara myndin úteftir, og verðin er jú sjáldan tað, hon sær út til at vera ...

Er verðin ikki tað, hon sær út til at vera, er popp/-rockverðin tað uppaftur minni. Og kanska er tað júst orsøkin til, at fløgan "Havsglóð", sum Knút gav út fyrr í ár, kom so óvart á nógv. Við orðum sum "djørv" og "hjartanemandi" skýrdu ummælarar "Havsglóð" alt fyri eitt ársins mest sermerktu fløguútgávu - mest av øllum, tí hon hevði nakað uppá hjarta.

## Pláss fyri tí ófullkomna

– Tað er okkurt ótrúliga løgið í, at ein fløga verður hildin at vera djørv og sermerkt, tí hon hevur nakað uppá hjarta. Onkusvegna má tað vera tekin um, at vit ikki vænta at nakað kemur frá hjartanum longur. Og tað er øgiliga syrgiligt og fátæksligt og sigur ikki so lítið um heimin, vit liva í, sigur Knút undrandi.

"Havsglóð" er bersøgin, húðleyst erlig og aftrar seg ikki við at seta orð á tað, vit helst ikki tosa um ella við at seta barnsligar, næstan bláoygdar spurningar um alt frá deyða, Gud og meiningina við øllum. Men fløgan var ikki ætlað sum ein tilvitað provokatión, sum skuldi fáa fólk at rakna við.

– Hatta er bara mín máti at gera tónleik og skriva sangir. Hevði eg gjørt tað øðrvísi, hevði tað ikki verið mín fløga longur. Meðan eg tók løgini upp, hugsaði eg nógv um, at tað í grundini er ein andsøgn í geva nakað so persónligt út á fløgu til øll onnur at lurta eftir. Men hinvegin, eg eri ikki tann einasti í verðini, sum havi upplivað sorg og sakn, og eg eri heldur ikki tann fyrsti, sum seti orð og tónleik til hesar kenslur. Kanska hetta er mín máti at vísa, at tað í okkara grunnskygdu glitriverð eisini finnast ófullkomin og ivandi menniskju við veruligum kenslum. At tað er í lagi at vera kiksaður - hvat tað so enn merkir ...

## Eitt andahol

Bara 16 ára gamal misti Knút mammu sína, og hann dylur ikki yvir, at sorgin og saknurin er ein afturvendandi íblástur til nógvar av tekstunum á "Havsglóð". Mamman var bara 37 ár, tá hon doyði av krabbameini eftir at hava verið sjúk í umleið eitt hálvt ár, og slíkt setur síni spor, kanska ikki beinanvegin, men Knút er sannførdur um, at tað hevur havt týdning fyri hansara persónsmenning seinni.

– At verða konfronteraður við eina so ógvusliga síðu av lívinum sum tannáringur ger, at tú verður noyddur til at taka støðu til ella fyrihalda teg til spurningar, tú annars neyvan hevði gjørt tær so nógvar tankar um í hasum aldrinum. Millum annað hevði tað við sær, at eg seinni byrjaði at undrast yvir, hvussu skjótt alt gongur, og hvussu nógv vit bara taka sum givið uttan at geva okkum far um, at alt kann verða tikið frá okkum eftir eini evarska lítlari løtu. Onkustaðni í Grisku gudalæruni verður nevnt, at "Gudarnir øvunda menniskjum, at tey doyggja", tí tað ger jú bara lívið meir intenst og vakurt, men so leingi vit halda okkum vera ódeyðilig, fáa vit jú ikki virðismett lívið.

Hesir tankar eru kanska mest týðiligir í lagnum "Fireworks". Hóast sangurin er ein ásannan av, at lívið er við at renna út, ganga fýrverkarí og candyfloss aftur, sum sorgblíðar myndir uppá vakurleikan, sum er treytaður av, at hann hvørvur líka skjótt, sum hann kom.

– Í mínum eygum og oyrum er tað einfalda mangan eisini tað vakrasta, og tað gongur eisini aftur uppá ymsar mátar á fløguni. Til dømis var upprunaligi tankin við lagnum "Havsglóð" at geva tí ein vøgguvísudám fyri á tann hátt at raka nakað einfalt, góðvarið og upprunaligt samstundis. Okkara fyrsta tónleikaliga uppliving stavar jú sum oftast frá eini vøgguvísu, og uppá ein máta er fløgan ein roynd at endurskapa nakað friðsælt og vakurt, har tú kanst sleppa at vera eina løtu uttan at verða órógvaður. Eitt andahol í eini tilveru, har ongin hevur tíð at steðga á og hugsa.

## Trúgv og list

Knút er sannførdur um, at evnini at skapa tónleik er ein gáva, hann hevur fingið frá Gudi, eins og øll list onkusvegna er ein endurspegling og játtan av Guds skapanarverki. Tí undrar tað hann stórliga, at kristindómurin hevur so ilt við at geva listini pláss og ofta heldur hana hoyra heima á einum lægri verðsligum støði

– Øll hendan løgna uppbýtingin av tí andaliga og tí verðsliga er eftir mínum tykki fullkomiliga burturvið. Og hesin skilnaðurin verður uppaftur meir tankavekjandi, tá tú hugsar um, at hann hvørki hevur støði í Bíbliuni ella søguliga. Søgan yðjur jú í dømum um menniskju, sum hava úttrykt sina gleði yvir at vera kristin við at skapa fantastisk listaverk, men eg dugi illa at